# ANDLIT ÚR LEIRI






**Ung og pen, vaksin og avgjørd, gomul og slitin - andlit eru so ymisk.**

**Hevði tað ikki verið stuttligt at gjørt eitt andlit úr leiri? At havt ein svansutan klump av leiri í hondini, elt hann til og formað eitt andlit úr honum, soleiðis sum tú heldur, at eitt andlit eigur at vera? Jú, kom og royn teg, og aftaná brennur leirlistakonan andlitið, sum tú síðan kanst avheinta.**

**Saman við Guðrið Poulsen kanst tú royna hesa tøkni týsdagin tann 16. oktobur kl. 11-12 og so aftur kl. 13-14.**

**Verkstaðið er í eldra partinum av Listasavninum. Inngongdin er við norðurendan á savninum út móti Gundadali.**







## SAVNSFAGNAÐURIN 2012